# Einki óregluligt hent í Hoyvíkshaganum

**Tórshavnar kommuna hevur alt uppá tað reina, tá tað kemur til byggingina í Maritugøtu. Tað siga Mikael Viderø, býararkitektur og Magni Dalsgaard, arkitektur á býráðnum. – Her er einki óregluligt farið fram, tvørturímóti eru allar lógir og ásetingar hildnar, siga teir**

BYGGILOYVI
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*





*Magni Dalsgaard og Mikael Viderø vísa aftur ákærunum sum býráðið hevur fingið í seinastuni. – Vit hava eina ógvuliga professionella byggimálsviðgerð, ið er á sera høgum støði. Tí er tað sera óheppið, tá fólk av órøttum ákæra okkum á hendan hátt fyri at fuska við byggiloyvum, siga teir*

*Myndir: Savnsmynd og Tórshavnar býráð*

Byggimálið í Hoyvíkshaganum, viðvíkjandi Torkilsgøtu og Maritugøtu, hevur í seinastuni skapt øsing ímillum fólk, og fólk hava sett spurnaðartekin við, hvørt byggingin yvirhøvur hevur verið lóglig.

Magni Dalsgaard og Mikael Viderø frá Tórshavnar Kommunu eru ógvuliga harmir um hesa øsing. – Her er alt farið regluliga fram, staðfesta teir.

Teir greiða frá, at longu í 1986 varð ein faldari givin út, ið fekk navnið Havnin í Framtíðini. Her vóru t.d. uppskot til, hvussu byggjast kundi í Hoyvíkshaganum. Í 1990 fingu Guttesen og Staksberg skeytið uppá eitt stórt stykki av Hoyvíkshaganum, sum teir høvdu keypt. Teir sendu beinanvegin kommununi uppskot til húsatekningar, sum vórðu góðkendar, tí tær vóru í tráð við heildarætlanina fyri økið, sum var teknað í faldaranum.

Men so kom kreppan, og tá lá øll húsabygging meiri ella minni still, og so varð einki bygt tá allíkavæl. Tá kreppan var av, keypti Høgni Mikkelsen stykki omanfyri tað, sum Guttesen og Staksberg áttu, væl vitandi um, at hús fóru at verða bygd á økið frammanfyri. Høgni bygdi fyrst á Jørundargøtu, og seinni á Torkilsgøtu.

– Táið so Guttesen og Staksberg í 2001 komu við byggiloyvistekningunum, og tær vóru í lagi, var ikki annað at gera enn at góðkenna tær, siga teir báðir.

### Fyribilsætlanir

Magni og Mikael halda, at stóra misskiljingin í hesum málinum allarhelst hevur verið tað, sum eitur fyribilsplanir.

– Tað, sum fólk opinbart ikki vita er, at táið tú keypir eitt grundstykki, skal kommunan góðkenna tað, sum skal byggjast. Tískil koma byggiharrarnir við tekningum, sum rættiliga neyvt vísa hvat verður bygt. Kommunan kann so góðkenna ella vraka tekningarnar. Í fyrsta umfari verður hugt at hvussu nógv fríøkið verður á økinum, hvussu parkeringsviðurskiftini verða, útsjóndini á húsinum o.s.fr., greiða Magni og Mikael frá.

Teir siga víðari, at um kommunan góðkennir hesa fyrstu tekningina, verða byggiætlaninar til ein fyribils plan, sum kann síggjast niðri á býráðnum. Tá merkir tað, at býaðið hevur góðkent ætlanina, men skal hava neyvari tekningar, fyri at geva byggiloyvi. Fyri at fáa byggiloyvi, skulu tekningarnar nevniliga eisini hava t.d. kloaksystem, hæddarmunir á økinum og innrætting. Eru tær tekningarnar í lagi, verður byggiloyvi givið, og nýggju tekningarnar verða lagdar afturat hinum fyribilsætlanunum. Tá byggiloyvið er givið, kann byggingin byrja.

– Guttesen og Staksberg fingu byggiloyvið í 2001, tá teir komu við byggiloyvistekningunum. Teir fingu byggiloyvið, tí ætlaninar hjá teimum vóru lógligar og í tráð við heildarætlanina fyri økið. Ætlaninar vórðu góðkendar áðrenn Høgni Mikkelsen fór undir at byggja; tað einasta sum manglaði hjá Guttesen og Staksberg, vóru byggiloyvistekningarnar. Tá tær komu, og somuleiðis vóru lógligar, varð byggiloyvið givið, siga teir báðir. – Hetta er eitt púra vanligt mál, sum er farið lógligt fram. Tað einasta sum er øðrvísi er, at kreppan kom ímillum og útsetti arbeiðið eina tíð, greiða teir báðir frá.

### Mismunurin

Eitt, sum íbúgvarnir í Torkilsgøtu eru ónøgdir við er, at teirra hús ikki vórðu góðkend við eini reising á 45 stig, men eftir kravið frá býráðnum skuldu lækkast til bert at hava 28 stig. Grundgevingin til hetta kann vera, at húsini í Torkilsgøtu eru breiðari enn vanlig hús, og tað kann vera ein av orsøkunum til, at byggiloyvið ikki varð givið til ætlaðu reisingina, sum hevði verðið sera høg. Útsýnið hjá teimum í Jørundargøtu hevur kanska verið grundgevingin, kanska hevur tað verið ein fagurfrøðilig avgerð.

– Men tað kunnu vit sum so ikki úttala okkum um, tí hvørgin okkara var her tá. Vit vita ikki grundgevingarnar fyri avgerðirnar hjá teimum, ið starvaðust her undan okkum, siga Magni og Mikael.

Teir siga, at klaguskrivið, sum íbúgvarnir í Torkilsgøtu hava sent til býráðið, fer at verða viðgjørt og lisið upp á fundi.

– Øll skriv av hesum slagi verða sjálvandi tikin í fullum álvara, men tað er avmarkað, hvat býráðið kann gera nú. Byggingin er góðkend, og hon var tað enntá áðrenn húsini hjá Høgna Mikkelsen komu upp á tal. Tað vildi verið sera undarligt at farið og tikið loyvið aftur nú, bert tí at nøkur fá hús missa útsýnið. Tað er heilt víst, at Guttesen og Staksberg høvdu saksøkt okkum, og ta sakina høvdu vit tapt, um so var, siga teir báðir arkitektarnir.

– Fólk mugu gera sær greitt, at um tey vilja búgva í einum býi, so kemur útsýnið í aðru røð. Tað er sjálvandi harmiligt at hava útsýni og so missa tað, men hatta er ikki nakað, sum vit kunnu gera nakað við, siga teir. – Vit kunnu ikki steðga húsabyggingum, tí tær taka útsýnið frá grannunum.

### Grannahoyringar

Eitt annað, sum tey í Torkilsgøtu eru so sera misnøgd við, er at býráðið ikki hevur kunnað tey um byggingina í Maritugøtu. Til tað siga teir báðir, at tað ikki er uppgávan hjá kommununi at fara út og kunna fólk um uppgávur hjá privatum byggiharrum.

– Kommunan ger eitt stórt arbeiði at kunna um byggiarbeiðið hjá okkum. Men vit fara ikki at senda arbeiðið hjá privatum út til kunningar. Sum sagt, so hava tekningarnar ligið her niðri allatíðina, og fólk hava verið meiri enn vælkomin oman at hyggja at ætlanunum fyri økið, siga teir. Teir halda, at Høgni Mikkelsen kanska kundi gjørt meiri við at kunna sínar keyparar um hvat fór at henda frammanfyri húsini, ella møguligvís kundi tað verið kravt, at skelti, ið vísa endaliga arbeiðið, skulu hanga uppi ímeðan bygt verður, so grannarnir kunnu vita hvat teir kunnu vænta sær.

– Grannahoyringar verða bara nýttar, um onkur søkir um serloyvi at byggja okkurt, ið fellur uttanfyri byggisamtyktina. T.d um ein familja má byggja húsið størri enn loyvi er givið til, tí tey hava fingið eitt brekað barn. Tá verður málið lagt út til grannahoyringar. Men í hesum førinum verða øll krøv uppfylt, og tískil er einki at senda út til grannahoyringar um.

Tey í Torkilsgøtu skilja ikki, hví tað verður lagt út til grannahoyringar at ein av íbúgvunum byggir sær ein kvist, táið tey ikki vórðu spurd um húsini í Maritugøtu, sum koma at standa beint uttanfyri stovuvindeyguni. Til hetta siga Mikael og Magni, at hetta eru tvær ymiskar byggingar, ið ikki mugu blandast saman.

– Tá ið kvisturin varð lagdur út til grannahoyringar er tað tí, at byggisamtyktin fyri Torkilsgøtu sigur, at øll húsini skulu vera eins. At hinir húsaeigararnir skuldu góðtaka handan kvistin, er tí, at um tey um nøkur ár eisini ætla sær at byggja kvist, skal hann vera sama slag, sum tann, ið nú er bygdur. Grannahoyringin var sostatt fyri at góðtaka ella mótmæla, at hatta er slagið av kvistum, ið verða bygdir í hesi gøtuni. Tey skrivaðu øll undir uppá, at tað var í lagi. Nú hava tey sostatt ikki loyvi at byggja sær nakran annan kvist enn hatta slagið. Tað hevur einki við húsini í Maritugøtu at gera, tí tað er ein heilt onnur byggiætlan, greiða teir frá.

### Gegnistrupulleikar

Ført hevur eisini verið fram, at Mikael Viderø skal vera gegnigur í hesi sakini, tí býararkitekturin sjálvur hevur arbeitt fyri Guttsen og Staksberg.

– Eg viðgangi, at eg havi arbeitt fyri felagið, men eg havi ikki teknað húsini, sum onkur vil vera við. Fyrstu tekningarnar av húsunum komu inn í 1990, tá var eg 18 ára gamal, so eg kann ikki taka mær æruna av hasum húsunum. Eg havi gjørt onkrar smávegis broytingar í tekningarnar seinni, t.d. broytt onkur vindeygu og tílíkt, men tað er ikki nakað eg havi arbeitt við burturav. Og hvørjaferð hetta byggimálið hevur verið frammi á fundi, eri eg farin út, netupp fyri at varveita sakligheitina í málinum, sigur hann.

Hann skilir, at tey halda tað vera spell, at fáa grannar, ið taka útsýni, men hann leggur dent á, at tað eru eingir trupulleikar eru í hesum byggimálinum. – Heldur ikki við gegninum sigur Mikael Viderø at enda.



# 700 fólk á stevnu í Hesti



*Nógv fólk var til setanina av stevnuni í Hesti leygardagin*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Tað var turt í veðrinum, men lotið var eitt sindur kalt, tá ið hestfólk bjóðaðu til stevnu í Hesti leygardagin. Vakra bygdin við sínum sermerkta malagróti omanfyri havnalagið, var snøgg og veitsluskrýdd, og fólk vóru vinarlig og blíð, tá ið tú stakk inn á gólvið**

ÚTOYGGJASTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Leygardagin helt Útoyggjafelagið sín triðja aðalfund, sum hesaferð varð hildin í Hesti.

Eins og undanfarin ár, varð aftur í ár skipað fyri stevnu í samband við fundin.

Sosialurin var við í Hesti, og í vikuni fara vit at gera nógv burtur úr degnum og ymisku tiltøkunum, sum vóru á skránni.

Umframt at umrøða sjálvan aðalfundin, fara vit at umrøða setanina, har Sanna Silvurstein, útoyggjaumboð í Hesti, beyð vælkomin, og Heðin Mortensen, býráðslimur í Tórshavnar kommunu, setti stevnuna. Aftaná sang Sólarmagnkórið av Velbastað nakrar vakrar sangir.

Vit fara eisini at gera nógv burtur úr tí, sum søgufróði, Pól á Kletti, ið hevur sínar røtur í Hesti, segði við minnisvarðan í bygdini hendan dagin. Minnisvarðin er reistur yvir teir, sum doyðu á sjónum og teir, sum fórust í bjørgunum. Tað eru júst 100 ár millum fyrstu nøvnini á minnisvarðanum og tey seinastu.

Á skránni hendan dagin vóru ymisk tiltøk, bæði fyri børn og vaksin, og skipað varð eisini fyri matsølu, har tú kundi keypa breyð við føroyskum viðskera, eins og tú kundi keypa bakkar við grind, spiki, turrum fiski og køldum eplum. Á havnalagnum fekst eisini vælsmakkandi suppa úr stóru gríituni hjá Birgiri Enni.

Umframt vanligu stevnutiltøkini, kundi tú eisini fara út í Koltur saman við Bjørn Patursson og familjuni, og skipað varð fyri gongutúri niðan á oynna í Hesti.

Høvið var eisini hjá fólki at vitja kirkjuna.

Uppi á skúlaloftinum hingu tvær framsýningar, sum lýsa gomlu tíðina. Onnur var ein myndafrásøgn um eitt neytakonugildi í bygdini, og hin lýsti stóra fólkafundin í Hesti fyri júst sjeyti árum síðan. Henda dagin í 1934, sum var ein av bestu summardøgum, ið fólk vita um at siga, var eisini gudstænasta í túninum í bygdini, har Jákup Dahl talaði.

Vit fara at gera burtur úr hesum degnum fyri sjeyti árum síðan, tá ið mett verður, at eini 1500 fólk úr stórum parti av landinum høvdu leitað sær út í Hest.

Útoyggjastevnurnar, sum áður eru hildnar í Skúvoy og á Kalsoynni, vórðu væl vitjaðar, og soleiðis var eisini við stevnuni í Hesti leygardagin.

Á veg úr aftur Hesti leygarkvøldið, metti Birgir Enni, skipari á Norðlýsinum, at Norðlýsið og Teistin – umframt aðrir bátar, sum sigldu ímillum – høvdu flutt eini 700 fólk út í Hest hendan dagin.

Seinast á skránni hetta stevnukvøld var dansur við bólkinum, Twilight.



*Grótið var eitt sindur skurvut at ganga eftir, nú Norðlýsið á heimferðini legði at ytri í havnini á Gomlurætt*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Tað er ikki á hvørjum degi, at so nógv fólk vitja í Hesti*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Veðrið var gott og turt, men tað var eitt sindur kalt í lotinum. Hesar eru komnar heilt úr Eysturoynni*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Óla Jákup úr Dímun er formaður í Útoyggjafelagnum, sum helt aðalfund í Hesi leygardagin*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*